

*Frítíðar- og Skeiðsdepilin Immanuel liggur á Eiler Jacobsensgøtu nr. 1 í Skálavík*



*Beinta Háberg Jacobsen, einkjan eftir Eiler Jacobsen, klippir snórin til depilin*



# Eiler Jacobsen
## 1930 – 2010

Immanuel Grunnurin, ið hevur latið byggja Depilin í Skálavík, er stovnaður av Eiler og Beintu Háberg Jacobsen.

Eiler varð føddur í Søldarfirði, og misti bert 2 ára gamal pápan, Sámal, á sjónum. Mamman, Helena, giftist uppaftur í 1934 við Nielsi Nicodemussen í Skálavík, hagar hon flutti við Eiler og yngra soninum Sámali. Her vuksu teir upp saman við hálvsystkjunum Bergtóru, Hildigunn, Napoleon og Maiken.

Eiler lærdi fyrst jarðarbrúk í Íslandi eftir kríggið. Men hann fór til skips við sildabáti í Norðsjónum og snørisskipum við Føroyar, Ísland og Grønland. Eiler førdi Brimnes, Vørðuna, Norðfarið, Atlantsfarið, Beinir og Boðanes - fyrst til línu- og seinni nótafiskiskap.

Í 1962 giftist Eiler við Beintu Háberg og búsettist í Havn. Beinta eigur sín lut í, at lívsverk Eilers hildnaðist so væl. Tey eiga børnini Sámal, Hjørdis, Petur og Eiler.

Í 1964 læt Eiler frystilínubátin Ísborg smíða á Skála og førdi hana sjálvur, til hann fekk Sólborg (1) bygda við kraftblokki og kølilast til sild í Norðsjónum og við Føroyar. Sólborg var eitt nýbrot, sum tvífaldaði veiðinøgd, fiskavirði og hýrur. Síðan komu nótaskipini Norðborg, sum bróðirin Sámal førdi, og Krúnborg (1), tá størstu skip í flotanum av sínum slag, eisini mikil frambrot til veiði um Norðuratlantshavið.

Í 1977 læt Eiler rækjuskipið Sólborg (2) byggja til fiskiskap við Grønlandi, Svalbard og Labrador, og deksbátin Fríborg til Eystrasalt. Eiler seldi hesa Sólborg í 1986 og bygdi nótaskipið Háborg, eitt skip framman fyri sína tíð.

Í kreppuárinum 1991 keypti hann rækjutrolaran Sólborg (3), sum varð seld til Grønlands 10 ár seinni. Ístaðin fyri at taka sær av løttum sum 68 ára gamal læt Eiler saman við børnunum uppsjóarskipið og stásfarið Krúnborg (2) byggja. Hana seldi hann í 2006.

Lívsverk Eilers verður neyvan yvirmett. Fjøld av monnum hava fiskað við skipum hansara. Teirra inntøkur hava verið støði undir hundraðtals húskjum og íkast til útbúgving hjá mongum føroyingum. Teir hava veitt hundraðtúsundtals tons av fiski íalt og tilført føroyska landshúsarhaldinum milliardir krónur í dagsprísum.

Vinnuliga virksemi Eilers hevur verið við til at tryggja Føroyum tess egnu og altjóða rættindi til tað fiskatilfeingi, sum um alt Norðuratlantshav nú er og fer at vera grundstøði undir búskapi Føroya lands og fólks.

Skeiðs- og frítíðardepilin Immanuel - sama navn sum sluppin, ið pápi Eilers sjólætst við – í Skálavík er ein varði yvir hendan merkismann Eiler og Beintu. Her í bygdini festi hann sum barn røtur, hvørs frukt hevur gagnað øllum Føroyum og føroyingum.

(Kelda: depil.fo)